# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk

*–57 prosent av afghansku kvinnunum verða giftar burtur, áðrenn tær fylla 16*

*Womankind Worldwide*

# Tær hava tað ikki betri enn undir Taliban

**Hóast føgur orð eru umstøðurnar hjá kvinnunum í Afghanistan líka ringar í dag sum undir Taliban-stýrinum.**



Kvinnurnar í Afghanistan hava fingið fleiri rættindi, enn tær høvdu fyri fimm árum síðani, tá Taliban varð rikið frá valdinum. Men hjá teimum flestu er gerandisdagurin tann sami, sum hann var.

Tað stendur at lesa í einari nýggjari frágreiðing um støðuna hjá teimum afghansku kvinnunum, og sum bleiv almannakunngjørd í London í vikuni.

Felagsskapurin Womankind Worldwide, sum hevur skrivað frágreiðingina, vísir á tey føgru orðini og tey nógvu lyftini, sum kvinnurnar í Afghanistan fingu, tá stýrið hjá Taliban var fallið. Sagt varð, at nú skuldu kvinnurnar fáa frælsi, og støðan hjá kvinnunum var eisini høvuðsevnið á einum altjóða Afghanistan-fundi í Týsklandi í desember í 2001.

Men hvat er hent síðani, spyr Womankind Worldwide. Jú, nakrar kvinnur eru komnar upp í politikk, men tann vanliga afghanska kvinnan hevur ikki merkt nakra broyting. Í fjør vóru 47 sokallað ærudráp skrásett, men tað veruliga talið er helst um 5.000, tí nógv tey flestu drápini verða ikki fráboðað. Ágangur ímóti kvinnum verður sjáldan kannaður, og kvinnur, sum melda menn fyri neyðtøku, kunnu sjálvar enda í fongsli – fyri ótrúskap.

Woman Worldkind skrivar eisini, at millum 60 og 80 prosent av teimum afghansku kvinnunum verða tvingaðar at gifta seg við monnum, sum familjan finnur teimum, og 57 prosent av kvinnunum verða giftar burtur, áðrenn tær fylla 16.

# Muslimarnir koyrdir til hús

**72 muslimar, sum arbeiddu í Charles de Gaulle-floghavnini í París, hava fingið sekkin.**

Teir seinastu mánaðarnar hevur leiðslan í Charles de Gaulle-floghavnini hildið eyga við muslimunum, sum arbeiða har, og fyribils er úrslitið, at 72 fólk hava fingið sekkin ella eru flutt í onnur størv. Orsøkin er sambært leiðsluni, at tey eru vandamikil fyri trygdina í floghavnini, skrivar AFP.

Leiðslan sigur seg hava avdúkað, at fleiri av teimum 72 hava verið í venjingarlegum hjá yvirgangsmonnum í Afghanistan og Pakistan, og ein teirra sigst hava verið vinmaður yvirgangsmannin Richard Reed, sum er dømdur fyri at hava roynt at spreingja eitt flogfar, sum var á veg úr Paris til USA í 2001. Hann hevði fjalt spreingievni í skónum, men bleiv avdúkaður.

Fleiri av teimum, sum hava mist arbeiðið í Charles de Gaulle-floghavnini, hava nú lagt sak ímóti leiðsluni, tí tey kenna seg sannførd um, at tey eru uppsøgd, tí tey eru muslimar. Muslimskir felagsskapir í Fraklandi leggja myndugleikarnar undir at skipa eina herferð ímóti muslimunum upp undir forsetavalið næsta ár.

# Undir eftirliti

Bretar fáa valla flutt seg, uttan at eitt ella annað myndatól fylgir við, hvat teir takast við. Í dag eru meiri enn fýra milliónir eftirlitstól í landinum ella eitt fyri hvørji 14 fólk. Samstundis hava myndugleikarnir hert eftirlitið við teimum, sum ferðast ella keypa, tí altsamt fleiri tól halda eyga við, nær bretar brúka sítt gjaldskort, og hvat teir brúka tað til. Almenni umboðsmaðurin heldur, at myndugleikarnir gera dekan ov nógv av. Hann sigur, at í summum førum kann tað tykjast, sum at fólk eru undir eftirliti, tá tey mugu metast ay hava rætt til at



vera fyri seg sjálvan. Umboðsmaðurin heldur, at Bretland er við at gerast eitt eftirlitssamfelag, har borgararnir ikki fáa flutt seg, uttan at onkur heldur eyga við teimum.

# Neyðtøkumál skelkar grikkar

**Árliga eru einar 4.500 neyðtøkur í Grikkalandi, men serliga eitt mál hevur skelkað tjóðina, og nú er forsetin komin upp í málið.**

Fýra skúladreingir í griksku bygdini Amarinthos eru skuldsettir fyri at hava neyðtikið eina 16 ára gamla bulgarska gentu. Gentan hevur greitt løgregluni frá, at tvær grikskar gentur avmyndaðu neyðtøkuna við fartelefon.

Málið hevur vakt stóran ans um alt Grikkaland og hevur reist spurningin um rasismu. Fjølmiðlarnir og myndugleikarnir hava givið teirri bulgarsku gentuni skyldina, og tað hevur fingið Karolos Papoulias, forseta at leggja seg út í málið.

– Vit grikkar hava upplivað útlegd og rasismu, men vit eiga ikki at geva innflytarum, sum koma higar at arbeiða, somu líðingar, sigur forsetin.

Tann 16 ára gamla gentan hevur greitt løgregluni frá, at hon bleiv neyðtikin í ein tíma, og ein talsmaður hjá løgregluni sigur við Reuters, at gentan sigur eftir øllum at døma satt. Teir fýra dreingirnir halda harafturímóti uppá, at talan var ikki um neyðtøku, og teir hava fingið stuðul frá bygdarfólkinum og fleiri fjølmiðlum. Men summir fjølmiðlar ávara.

– Hvør einasti demokratur í hesum landi eigur at vera í øðini um tann rasistiska hugburðin, sum er komin undan kavi í sambandi við hetta málið, skrivaði blaðið Eleftherotypia í oddagrein fyrradagin.

## STUTT SAGT

### Vendir ikki

Herfyri boðaðu bretskir havgranskarar frá, at Golfstreymurin stóð stillur nakrar dagar í november í 2004, og teir søgdu seg bera ótta fyri, at hann fer at vikna og kanska at steðga orsakað av veðurlagsbroytingunum. Hesum eru norskir havgranskarar ikki samdir við teimum í. Teir ásanmna, at Golfstreymurin broytist javnan, men teir vísa samstundis á, at sjógvurin í Barentshavinum hevur ongantíð verið so heitur sum tey seinastu fimm árini. Norsku granskararnir hava ilt við at trúgva, at Golfstreymurin stóð stillur nakrar dagar í 2004, tí tað sást ikki á nøkrum mátingum í Barentshavinum, siga teir. Teir halda ikki sum bretar, at Golfstreymurin er í ferð við at vikna, ella at hann fer at venda.

### Prodi í hernað

Í Italia hava myndugleikarnir mist tolið við teirri víðagitnu mafiuni í stórbýnum Napoli. Í seinastuni hava fleiri kravt, at stjórnin skal senda hermenn til býin fyri at fáa bilbukt við mafiuna, men tað við Romano Prodi, forsætisráðharri, ikki. Ístaðin fyri hevur hann gjørt av at senda 1.000 løgreglumenn afturat til Napoli í næstu viku. Tað er í tøkum tíma, tí teir seinastu tólv dagarnar hava 14 fólk latið lív í gøtunum í býnum. Napoli hevur verið herjaður av skipaðum kriminaliteti í eini 200 ár. Ein stórur trupulleiki er tað stóra arbeiðsloysið í býnum. Sagt verður, at helmingurin av av øllum monnunum millum 25 og 29 ár eru arbeiðsleysir.